# Orðingar, tá ið vit nýta orðið Glasir í skúlahøpi

***Glasir*** verður bent sum eitt nú Beinir, Birgir, Ægir og Mjølnir

| | |
|---|---|
| Hvørfall | Glasir |
| Hvønnfall | Glasir |
| Hvørjumfall | Glasi |
| Hvørsfall | Glasis |

**Kunngerð**
Frá Glasi – allir fyrstaárnæmingar møta mánamorgunin 22. august kl. 9. 2. árs- og 3. ársnæmingar møta týsdagin 23. august kl. 8.10 og hava vanliga skúlagongd.
Glasir

**Starvsfólkaútferð**
Gongutúrurin byrjar á Lambafelli, og so verður gingið í haga og eftir gøtum gjøgnum Havnardal og heim á Glasir, har borðreitt verður við onkrum góðum.
Glasir

Glasir er karmur um mangt mentanarvirksemi bæði í skúlatíð og uttan fyri vanliga skúlatíð.

Glasir hevur eitt ógvuliga samansett læraralið.

Vit vilja, at fólk síggja Glasir sum ein framkomnan skúla við útbúgvingartilboðum til fleiri samfelagsbólkar.

Bussleið koyrir úr miðbýnum, úr Hoyvík og av Argjum *til Glasir*/*út á Glasir*/*niðan á Glasir*/*yvir á Glasir*[1].

Glasisnæmingar/næmingar á Glasi hava enn eina ferð luttikið í altjóða kapping í marknaðarførslu við góðum úrsliti.

Næmingar á Glasi hava arbeitt við spennandi verkætlan um grøna orku.

Leiðslan á Glasi arbeiðir støðugt við mennandi og avbjóðandi arbeiðsuppgávum og framhaldandi eftirútbúgving.

Starvsfólk hjá Glasi arbeiða støðugt við at betra og dagføra útbúgvingartilboðið.

## Eitur tað *á Glasir* ella *í Glasi*?

Mælt verður til at nýta *á* í sambandi við tað at arbeiða og vera lesandi á hesum nýggja skúla, av tí at hægri lærustovnar vanliga verða umrøddir við *á*, t.d. “fara á universitet”, “fara á Setrið at lesa”, “fara á (lærdan) háskúla”, “fara á studentaskúla/handilsskúla/á tekniska skúla”, “á teirri útbúgvingini...”

---

[1] Hetta valdast, hvar ein býr, og hvaðan ein kemur, men *til* eigur at vera ein íðuliga nýtt fyriseting í hesum sambandi

Sjálvsagt kann *í* eisini verða nýtt, men tá snýr tað seg meiri um ítøkiliga staðið; t.d. "Vit eru í Glasi og gera okkum liðug við framløguna" (sjá eisini dømið niðanfyri um hitaskipanina)

Orðing, sum ivaleyst bæði kann vera við *á* og *í*:
Hitaskipanin *á/í Glasi* er sera framkomin og hin einasta av sínum slag í Føroyum

Fyrisetingarnar *hjá* og *frá* verða eisini nýttar, sjá dømi omanfyri, men tær stýra hvørjumfalli og eru ikki so truplar at fáast við.